

# Frasier

**16 septembur í 1993 hevði skemtiraðsendingin Frasier frumframførslu á rásini NBC. Sendingin hevur havt nógvan undanvind síðan tá og nógv hava elskað at flent eftir teimum í Frasier – 21 Emmy virðislønir.**

### Tey í Frasier

**PERI GILPIN**
Roz Doyle
**KELSEY GRAMMER**
Dr. Frasier Crane
**JANE LEEVES**
Daphne Moon
**JOHN MAHONEY**
Martin Crane
**MOOSE**
Eddie
**DAVID HYDE PIERCE**
Niles Crane

Ikki minnið enn fimm ferðir upp í slag vann Frasier Emmy virðislønir fyri Outstanding Comedy Series. Og hetta er met – frammanfyri t.d. Hill Street Blues, L.A. Law og Cheers, allar eru hesar sendingar, ið Frasier hevur sín uppruna í. Eisini hava tey vunnið í Golden Globe fyri Best Musical or Comedy Series og Best Actor (Kelsey Grammer).
Fólkakæra skemtirøðin gevur, dagliga á TvDanmark 2, innlit í gerandisdagin hjá tí snobbuta og ósikra sálarfrøðinginum, Dr. Frasier Crane (Kelsey Grammer), ið er vertur á Seattle Radio Advice Show. Her gevir Frasier dýr ráð til tey, ið ringja inn við sínum nevrotisku trupulleikum og eisini sínum lukkum.

Kelsey Grammer hevur høvuðsleiklutin í Frasier, sum Dr. Frasier Crane. Júst hesin persónurin er kendur frá kendur skemtirøðini Cheers, sum Grammer eisini spældi. Eftir sjónleikaraskúla arbeiddi ungi Kelsey Grammer við Shakespeare –og George Bernard Shaw leiklutum á Old Globe Theatre í San Diego. Seinni arbeiddi Grammer meiri út um landið, t.d. á Broadway við Macbeth og Othello – fyri ikki so langari tíð síðan var hann í Richard II. Grammer býr saman við konuni, teirra dóttir og nøkrum kelidjórum í Los Angeles umráðnum. Sangur, klaverspæl, golf, tennis og at sigla hansara 37 fót seglbát eru millum hansara hobby.

Tær fínu sigarirnar og hansara háfíni verðumáti mundu fari fyri skeyti, tá hansara grummi pápi, Martin, noyddist at flyta inn til sonin. Við sær hevði Martin sín egna mynstruta yndisstól, sum ikki matjaði til sofasettið hjá Frasier; ein næstan framsjónskan sjúkrarøktara, Daphne Moon, og ein Jack Russel terrier, Eddie, sum Frasier heldur ikki kann torga. Bróðurin vitjar ofta heimið hjá Frasier. Niles (David Hyde Pierce) er eisini ein snobbutur ungur maður, hann er eisini sjúkliga kappingarsinnaður. Hesin hevur ein langtíðar og serligan áhuga í Daphne. Til arbeiðis hevur Frasier útvarpsframleiðaran Roz Doyle afturat sær, hon er annars eina og óð eftir mannfólki.
Tíggjunda sesongin koyrir nú á TvDanmark 2 og dámurin tekur ongan enda.





